

Lars Høegh. Tvær ferðir mátti fyrrverandi danski landsliðsmálverjin í meskarnar eftir bóltinum
Mynd: *hilmar jan*

Framhald av síðu 15

fyri at spæla menninar frammanfyri, í øðrum lagi eru tað langt frá allir, ið tora at bjóða seg til á miðvøllinum, og í triða lagi misti Kári Reynheim alt ov nógvar bóltar burtur í óneyðugum driblingum, hóast menn bjóðaðu seg til.

Fleiri møguleikar, men...

Í tí beinleiðis málsøkjandi spælinum var ikki so illa statt Jens Erik Rasmussen og Torkil Nielsen skaptu í samarbeiði við Abraham Hansen fleiri vandamiklar atsóknir. Tað var eisini Abraham Hansen, ið sendi Kára Reynheim av stað, tá hesin skoraði fyrra málið.

Gunnar Mohr slapp ikki at royna seg rættiliga, tí hann ferð eftir ferð varð súltaður á off side markinum. Hann var kortini maðurin aftanfyri seinna málið, tá hann beinanvegin spældi Kára Reynheim, ið hesa ferð spældi beinanvegin og áðrenn Gunnar varð off side, og so kundi Jens Erik Rasmussen fylgja upp. Altso bæði føroysku málini eftir skilagóðar avleveringar, ið fella beinanvegin og harvið skapa rúm.

Blindar driblingar sum leyst krút

Her hevur Kári Reynheim nógv at læra. Hann er sterkur, tá tað er rætt at dribla og eingin annar møguleiki er. Men hann spillir tvífalt burtur. Gamaní, hann skoraði eitt mál, men tað var júst uppá eina avlevering, sum hann hevur 20 høvi til at gera í einum dysti. Kemur ikki broyting í her, so má hann antin av liðnum ella hevur Páll Guðlaugsson skaffa sær ein varandi trupulleika, ið bara kemur at vaksa. Loysa hann og evnagóði B 36-leikarin hendan trupulleikan, so er nógv vunnið, tí tá er hann verðin ein tann mest týdningarmikli leikarin á liðnum: ikki bert hann, men einir 2-4 aðriri gerast tá knappliga eins vandamiklir fyri mótpartin.

Óneyðug mál

Og úrslitið? Tað hevur minni at siga, men dysturin endaði 2-2. Kortini mugu vit nevna bæði tey, tí tey vitna um vantandi royndir eins og fyrsta útskiftingin, ið fór fram, uttan at Nemus varð spurdur eftir.

Fyrst fær ein ella annar dani loyvi til at dribla, meðpan ein passiv verja hyggur at, so Kaj Leo Johannesen er noyddur at koma út; í seinna førinum letur Kaj Leo Johannesen Kára Reynheim skipa fyri manngarðinum og føroyska verjan kann tur seg tøla og stendur sum ryssa uppi yvir deyðum fyli, tá danir gera bara einki uttan lata bóltin liggja, tá tríggir hava lopið uppum hann. So fer fjórði maðurin spákandi og plaserar hann í netið.

Læruríkt

Samanumtikið eitt læruríkt venjingarkvøld. Onkur vil kanska halda, at tað gekst so væl í hond, at vit áttu at vunnið. Slíkt er óviðkomandi tala: vit skulu gera mistøkini upp og ikki minst gera upp, hvar vit ikki sluppu at royna okkum av álvara, orsakað av, at talan var um eitt danskt botnlið. So kann nakað rættast...

ówh



Aftursvar til róðrar-áhugaðan vágbing!

Jóansøkuróðurin í ár var milt sagt ein fiasko, og kann á ongan hátt forsvarast. Um róðurin ikki kann gerast rættvísari eigur Vágsfjørður at verða strikaður til FM-róður.

Tað er alt annað enn stuttligt hjá seriøsum itróttarfólki, sum venja hart nærum hvørt kvøld í triggjar mánaðar, at ferðast líka suður til Vágs, og tá siggja, at tú als ongan møguleika hevur at vinna. Fyrst og fremst tí at bátarnir við norðrara land høvdu fyrimun av likindunum, men eisini tí at startlinjan og míllinjan als ikki vóru javnfjarðar. Hetta bar í sær, at bátarnir við sýðra land høvdu longra teinin at rógva! Heldur illa kann accepterast, at dómarin rópar, ha[illegible] og hóttir við diskv[illegible] og aðru hvørj[illegible]. Tað hvørki kann [illegible] eigur at vera rætt!

Tú s[illegible] um hjá Huldu var óvæntaður, men at tær róðu so væl, at tær høvdu vunnið undir ollum umstøðum. Munnu sílagenturnar, sum høvdu vunnið báðar róðrarnar frammanundan, trúgva hesu[illegible]. Tær løgu har suðuri á tjø[illegible]um og blivu nummar fimm. Eftir 5-mannaførum við dreingjum, 6-mannaførum við monnum og í 8-mannafararóðrinum kund[illegible] óvæntað henda, av ti at Kollur, Sólmundur og Knørrur, ið allir hava fult stigatal, lógu við norðrara land.

At kvinnurnar a Fall Fanga vunnu, kom heldur ikki óvæntað á [illegible]ran, men hon hendi tað heilt sjálk[illegible]a, at tær vóru me[illegible]n 20 sek. framman fy[illegible] nr. 2. Eisini tær lógu [illegible] norðrara land. Men um klaksviksgenturnar kann sigast, at tær ivaleg[illegible] vunnið undir ollum umstøðum hendadagin. Hjá 10-mannaførunum var eisini óvæntað at Vágbingurin, sum hevur verið nr. seks hinar róðrarnar, skuldi gerast tann heilt stóra høttanin. Men at Havnarbáturin at enda stakk seg fram um báðar suðuroyarbátarnar, sum báðir lógu norðast, má sigast at vera væl klárað. Hinvegin endaði vinnarin av Skálafjarðarstevnuni heilt aftur í fimta plássinum. Tað var Nólsoyingurin, og lá hann syðst á fjørðinum.

So um hesin vágbingurin hevði verið so róðraráhugaður, sum hann letist, hevði hann uttan iva sæð, at úrslitini als ikki vóru sum tey »áttu«.

Eg freistist at halda henda vágbingin bert hava áhuga í at forsvara jóansøkuróðurin út frá fíggjarligum sjónarmiðum. Men eg kann siga hesum »róðraráhugaða«, at tá vit í apríl settu okkum í bátin, hugsaðu vit ikki um at kappróðrarfelagið í Vági skuldi tjena pengar í ár. Vit hugsaðu um og vónaðu at fáa eina spennandi og rættvísa kapping. Og kann hetta ikki lata seg gera í Vági, má FM-róðurin har strikast. Tí sjálvandi mugu vit seta tað itróttarliga í høsætið, og lata traditiónir vera traditiónir og pengar vera pengar.

Misnøgdur róðrarmaður



Hulda av Tvøroyri, sum onki stig hevði frammanundan, vann trygt á Jóansøku, meðan Sílið, sum hevur vunnið allar hinar róðrarnar, gjørdist nr. fimm. Var hetta - og fleiri onnur óvænað úrslit - tekin um, at Vágsfjørður er verðin ónýtiligur til kappróður?